UTTAN ÚR HEIMI

## Fríhandil nærkast

Í nøkur ár hevur verið arbeit við at skipa teir báðar amerikonsku heimspartarnar sum eitt fríhandilsøki, og arbeiðið gongur nú so væl, at fríhandilin kanska verður veruleiki innan ársskiftið, sigur meksikanski fíggjarmálaráðharrin, Fernando Canales.

Ósemja hevur verið ímillum tey norðuramerikonsku og tey suðuramerikonsku londini, men týsdagin løgdu USA, Meksiko, Kanada, Kili og Costa Rica eitt semingsuppskot fram. Sambært meksikanska fíggjarmálaráðharranum er ósemja um útflutningsstuðul til ymsar vørur, men hann væntar kortini, at tað fer at bera til at finna eina semju.

Undir samráðingunum um fríhandilin hevur ósemja verið ímillum USA øðrumegin og Brasil og Argentina hinumegin. Tey bæði suðuramerikonsku londini vilja vera við, at USA hugsar ov nógv um egin áhugamál, og tey hava gjørt greitt, at tey fara ikki at slaka fyri krøvum úr Washington.

## Slapp í síðstu løtu

Tað var um reppið, at NATO-hermenn fingu fatur á tí eftirlýsta serbiska krígsbrotsmanninum Radovan Karadzic í síðsta mánað.

Sambært høvuðsákæranum hjá krígsbrotsmannadómstólinum í Haag, Carlu Ponti, lupu NATO-hermenn á bústaðin hjá Karadzic í býnum Pale tann 13. januar, tí teir høvdu fingið at vita, at hann var við hús. Men hermenninir komu ov seint, tí Karadzic var farin haðani tveir tímar frammanundan. Radovan Karadzic er skuldsettur fyri fólkamorð í krígnum í Bosnia frá 1992 til 1995. Hann er millum annað skuldsettur fyri at hava skipað fyri hópmorðinum í býnum Screbrenica í 1995, har serbar beindu fyri meiri enn 7.000 muslimskum monnum og unglingum.

NATO-hermenninir leita eisini eftir kroatiska generalinum Ante Gotovina, sum er skuldsettur fyri krígsbrotsverk í landspartinum Krajina í 1995. USA hevur lovað 30 milliónir krónur í finningarløn, um onkur kemur við upplýsingum, sum kunnu gera, at generalurin verður tikin.

## Einki mutur

Eitt blað í Irak vil vera við, at russisk oljufeløg, politiskir flokkar og sjálvt tann russiska kirkjan fingu muturpengar frá stýrinum hjá Saddam Hussein.

Í Moskva avsannar uttanríkisráðið upplýsingarnar. Sagt verður, at allur samhandil og alt samskifti ímillum Russland og Irak bleiv gjørt samsvarandi ST-samtyktunum um Irak, og at øll olja, sum russar keyptu úr Irak, varð goldin ST, soleiðis sum reglurnar ásettu.

Russisku myndugleikarnir siga seg hava illgruna um, at tíðindini í irakska blaðnum kunnu hava samband við, at Russland sýtti fyri at taka undir við álopinum á Irak. Amerikanararnir boðaðu í desember frá, at russiskar fyritøkur fáa ikki lut í arbeiðinum at endurreisa Irak. Somu boð fingu fyritøkur í Kanada, Fraklandi, Týsklandi og Kina. Bush-stjórnin hevur kortini seinni gjørt av, at kanadiskar fyritøkur kunnu fáa sáttmálar í Irak.

## Full ferð á Volvo

Tað gongur sera væl hjá lastbiladeildini hjá svensku bilverksmiðjuni Volvo. Avlopið í fjør var 5,5 milliardir krónur, og tað var næstan tríggjar ferðir meiri enn í 2002. Umsetningurin vaks trý prosent í fjør og var umleið 45 milliardir krónur.

Volvo hevur havt ætlanir um at leggja saman við hina stóru svensku lastbilaverksmiðjuna Scania, men ES legði fót fyri ætlanunum. Volvo eigur frammanundan umleið 45 prosent av Scania, men ES hevur álagt fyritøkuni at selja burtur av partabrøvunum. Tað fer Volvo kortini ikki at gera, men hevur ístaðin fyri gjørt av at stovna eitt serligt felag, sum skal hava partabrøvini í Scania um hendi.

Hóast tað yvirhøvur gongur væl hjá Volvo, fór nevndarformaðurin Lars Ramqvist frá fyrr í vikuni. Nýggjur nevndarformaðurin eitur Finn Johansson.

# Bush biður ST um hjálp í Irak



*Bush, forseti, kennir seg nú noyddan at biðja ST-aðalskrivaran, Kofi Annan, um hjálp til at loysa ósemjuna ímillum teir ymsu bólkarnar í Irak. Týsdagin viðgjørdu teir støðuna*

**Amerikanska forsetanum tørvar hjálp til at fáa semju ímillum teir stríðandi partarnar í Irak. Nú vil hann hava ST at royna seg sum semingsmann**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyrradagin var ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, í Hvítu Húsunum í Washington og tosaði við George W. Bush, forseta.

Keldur, sum standa forsetanum nær, siga við blaðið New York Times, at á fundinum fekk Kofi Annan ein hóp av amerikonskum uppskotum um, hvussu USA heldur, at irakar kunnu taka við valdinum í Irak. Samstundis skal forsetin hava gjørt greitt, at eydnast tað ikki at fáa irakar at semjast um valdsbýtið, er hann til reiðar at bíða við at lata teimum valdið í landinum.

Ein kelda í Bush-umsitingini sigur við New York Times, at USA hevur lagt stórt trýst á ST-aðalskrivaran fyri at fáa ST at loysa ósemjuna ímillum teir iraksku bólkarnar, tí USA er í ferð við at ásanna, at ST kanska situr við teirri røttu loysnini.

Higartil hevur amerikanska stjórnin hildið ST uttan fyri alla ávirkan í Irak, men stjórnin ásannar nú, at henni tørvar hjálp fyri at sleppa burtur úr tí politiska óføri, sum hon er komin í.

Tann upprunaliga amerikanska ætlanin um, hvussu og nær irakar skulu taka við valdinum í Irak, hevur elvt til hvøss mótmæli. Serliga tann shiamuslimski leiðarin Ali al-Sistani hevur mótmælt amerikonsku ætlanini. Shiamuslimarnir krevja, at ein nýggj stjórn skal veljast við beinleiðis vali longu í summar. Eitt tílíkt val høvdu shiamuslimarnir vunnið, tí teir eru í meiriluta í Irak.

ST hevur higartil roynt at hildið seg uttan fyri ósemjuna í Irak, men Kofi Annan segði aftan á fundin við Bush, at ST er sinnað at gera sítt til at loysa ósemjuna. Hann legði tó afturat, at ST ætlar sær ikki at virka sum ein medhjálpari hjá hersetingarvaldinum. Tí krevur ST, at USA skal sleppa einum parti av valdinum í Irak, men hesum hava eitt nú Dick Cheney, varaforseti, og Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, verið ímóti higartil.

# Tað verður John ella John

**Aftan á tey seinastu uppstillingarvalini í USA bendir alt á, at annaðhvørt John Kerry ella John Edwards skal bjóða Bush av**

UPPSTILLING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

John Kerry vann uppstillingarvalið í fimm statum fyrradagin. John Edwards vann eitt og Wesley Clark eitt. Kerry vann í Arizona, Delaware, Missouri, North Dakota og New Mexico. Edwards vann í South Carolina og Wesley Clark vann í Oklahoma.

John Kerry hevur nú vunnið sjey av níggju uppstillingarvalum og er tí greitt á odda. At John Edwards verður mettur sum maðurin, ið kann taka dystin upp við John Kerry, kemst av, at hann var nummar tvey í tveimum statum og bara nakrar hundrað atkvøður frá at vinna í Oklahoma.

Eygleiðarar siga, at úrslitið fyrrakvøldið vísir, at John Edwards hevur gott tak á veljarunum í suðurstatunum og longri vesturi, og at tað kann fáa avgerandi týdning fyri tað endaliga úrslitið, tá demokratarnir skulu gera av, hvør skal bjóða Bush av í november.



# Føroyarutan verður óbroytt

**Nógv umrødda umskipanin hjá danska flogfelagnum Maersk Air fer ikki at broyta nakað á Føroyarutuni**



*Maersk Air fer í framtíðin at røkja Føroyarutuna við Boeing 737-500 flogførum, sum ikki verða ávirkað av, at fleiri rutur skulu flúgvast suðureftir*

*Mynd: Edvard Joensen*

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Rutuflúgvingin millum Føroyar og Danmark fer at halda fram eftir sama leisti sum higartil.

Hóast Maersk Air hevur gjørt umfatandi broytingar innanfelgs, verður Føroyarutan framhaldandi tann sama, sum hon hevur verið.

Per Brinch, kunningarstjóri hjá Maersk Air, sigur, at tað ber ikki til at gera broytingar i príspolitikkinum á Føroyarutuni. Har er gjørd ein avtala, sum skal haldast, sigur hann.

– Hon gongur í stuttum út uppá, at tað er ikki loyvt at kappast um prís á hesi leiðini, sigur kunningarstjórin hjá Maersk Air, sum kappast við Atlantsflog um ferðafólkini millum Føroyar og Danmark.

Maersk Air legði á tíðindafundi í Keypmannahavn mikumorgunin fram eina nýggja ætlan, sum boðar frá 11 nýggjum fráferðum suðureftir. Tær nýggju ruturnar fara allar til Fraklands og Spania.

Hesar ruturnar krevja eisini, at nógv flogfør eru tøk alla tíðina til hesa flúgving.

Men tað fer ikki at ávirka Føroyarutuna heldur, sigur Per Brinch.

Spurdur um tað ikki kann henda, at flogfarið til Føroya verður tikið úr hesi rutuni og sent aðrastaðni, um tað ikki fær lent í Føroyum til ásetta tíð, sigur Per brinch, at soleiðis verður ikki.

– Flúgvingin suðureftir verður við teimum nýggju, stóru Boeing 737-700. Føroyarutan verður í framtíðini røkt av Boeing 737-500, sigur hann.

Umframt at Maersk Air stovnar fleiri nýggjar rutur, verða eisini broytingar gjørdar umborð á flogførunum.

Tað fer í framtíðini at bera til at velja fleiri »deildir« umborð, sigur Per Brinch, kunningarstjóri.

Á rutunum suðureftir kunnu ferðafólkini velja at sita í »fleksiblum« setrum, sum veðra nevnd frá Small til X Large.

Small er vanligt setur, har 70 sentimetrar eru millum stólaryggirnar. Síðan økist plássið, til komið er til X-Large, sum hevur eina frástøðu upp á 90 sentimetrar og 50 prosent breiðari setur. Hetta verður sjálvandi goldið eyka fyri.



*Tað er ikki loyvt at kappast um prís á Føroyarutuni, sigur Per Brinch. kunningarstjóri hjá Maersk Air*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Góða eydnu



*Stjórin í Atlantsflogi dugir at ímynda sær eitt møguligt samstarv millum feløgini bæði, sum í dag kappast á Føroyarutuni*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Stjórin í Atlantsflogi ynskir kappingarneytanum, Maersk Air, góða eydnu við nýggja tiltakinum at umskipa felagið**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Atlantsflog fer neyvan at merkja tað stóra til umskipanina í Maersk Air, heldur Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi.

Av tí, at umskipanin hjá Maerska Air ikki umfatar Føroyarutuna, hevur Magni Arge ikki tær stóru viðmerkingarnar til tað, sum Maersk Air nú hevur kunngjørt, aðrar enn, at hann ynskir teimum góða eydnu.

Tað er greitt, ásannar Magni Arge, at Maersk Air satsar upp á at fáa ferðafólk at flúgva suðureftir. Tað ger tað sjálvandi eisini lættari hjá føroyingum at ferðast suður til Meðalhavið. Og soleiðis kann tað koma at ávirka Føroyarutuna, um fólk velja at flúgva allan vegin við Maersk Air, ásannar hann.

Men hinvegin vísir hann á, at tann nógva ferðingin til summarfrítíðarstøðini vanliga er við charterfeløgum, og tey nýta onnur flogfør. So Atlantsflog væntar eisini í framtíðini at sleppa at flyta føroyingar millum Føroyar og Danmark.

– Eg verði ikki kløkkur av hesum, sigur Magni Arge. Men hvør veit? Kanska skulu vit hyggja upp á eitt samstarv við Maersk Air, sum kann ganga út uppá, at vit flúgva fók til Danmarkar, og Maersk Air flytir tey víðari, sigur hann.

# Stór KT-stevna í apríl

**Í døgunum 22. og 23. apríl verður stór KT-stevna í Norðurlandahúsinum. Góðir 20 framsýnarar fara at vísa tað nýggjasta, sum føroysk kunningartøkni hevur at bjóða. Enn eru nøkur pláss eftir til framsýnarar**

TÍINDASKRIV

Á KT-stevnuni 2004 eru virki, feløg og stovnar í Føroyum, ið bjóða seg fram sum veitarar av vørum, tænastum og skipanum við kunningartøkni.

KT-stevnan er hildin einaferð áður í 2002. Ta ferðina var talan um eina almenna stevnu, men hesaferð er hon skipað nakað øðrvísi. Málbólkurin er fyrst og fremst vinnan og almennir stovnar. KT-stevnan er sostatt ein stevna, har virki venda sær til virki og stovnar. Harumframt vendir stevnan sær eisini til næmingar á miðnámsskúlunum og hægri útbúgvingarstovnum. Annars eru karmarnir á leið teir somu.

KT-stevnan verður skipað við áhugaverdari framsýning í Norðurlandahúsinum og ráðstevnu. Endamálið er at sýna fram og kunna um førleikar hjá føroysku kt-vinnuni í dag. Samstundis verða fleiri áhugaverdir fyrilestrar hildnir í Útvarpshøllini hesar dagarnar.

KT-skeptikarin og filosoffurin Carsten Graff heldur fyrilestur um telduna sum tøkniliga tátu. Í hinum borðinum røður eldhugaði menningarstjórin hjá donsku fyritøkuni TDC, Preben Mejer, um framtíðar kunningartøkni, nevnd Pervasive Computing. Eitt evni verður eisini kt-trygd, har danski kt-trygdarbólkurin greiðir frá royndum í gerandisdegnum.

Ætlanin er eisini at skipa fyri einum kjakpalli, har umboð fyri føroysku vinnuna, stovnar og politisku skipanina luttaka. Fokus verður sett á útlitini hjá føroysku kt-vinnuni, og spurt verður eitt nú, um kunningartøkni veruliga kann gerast ein munagóð útflutningsvinna.

Higartil hava 16 framsýnarar boðað frá luttøku til ársins KT-stevnu, sum verður í Norðurlandahúsinum 22. og 23. apríl. Væntandi verða millum 20 og 25 framsýnarar. Bert 20 prosent av gólvplássi eru eftir, og tí skulu áhugað skunda sær at boða frá luttøku. Framsýnarar kunnu melda til við at venda sær til Virkisráðgeving ella heinta tilmeldingarblað á heimasíðuni www.kt.fo.

Roknað verður við 350 vitjandi hvønn dagin.